


www.oljan.fo

**Jan Müller** 28 - 12 - 2012

# Olju- og frálandavinna á Jobmatch

Jobmatch fer av bakkastokki í dag kl. 13.00 tá Johan Dahl. landstýrismaður setur starvsstevnuna. Millum fyritøkurnar, sum luttaka á Jobmatch eru eisini føroyskar fyritøkur, sum burturav arbeiða í olju- og fráladnavinnuni, Atlantic Petroleum og Skansi Offshore umframt Atlantic Airways, sum í mong ár hevur annað beinið í hesum vinnum. Harumframt er vinnuluttøkan fjølbroytt við fyritøkum sum Articon, NEMA, Formula, Bakkafrost, Havsbrún, Sendistovan, BankNordik, Smyril Line, Elektron og aðrar. Eftirmetingar vísa, at tey vitjandi á Jobmatch eru áhugaði í eini røð av ymiskum vinnugreinum, bæði innan tað privata og tað almanna. Somuleiðis fær umleið 5. hvør vitjandi nakað ítøkiligt burturúr, antin starv, praktikkpláss ella samstarv um serritgerðir ella aðrar uppgávur. Í ár er Jobmatch víðnað við einum netverkskvøldi, sum byrjar kl 20.00 við kjaki og tónleiki frá Hanusi G. Johansen, Peturi Háberg og Guðrun Háberg. Kjakevni á netverkskvøldinum verður - "Hvussu gera vit Føroyar meiri áhugaverdar fyri okkara ungu fólk at búgva í, soleiðis at fráflyting verður vend til tilflyting". Á netverkskvøldinum verður eisini høvið til at fáa sær okkurt leskandi. Les meira um skránna á www. jobmatch.fo Mynd - Frálandareiðaríið Skansi Offshore flytur fyrst í nýggja árinum inn í nýggja og snøgga bygningin á Skansavegi í Havn við útsýni út á Skansan. Mynd oljan.fo/Jan Müller